→

fyri tey gomlu at skilja.

Fjølmiðlarnir boða frá harðskapi, deyða, óndskapi og ábyrgdarloysi. Tíðin er sanniliga eisini merkt av, at vit øll krevja onkran drignan til svars fyri skeivu gongdina. Men syndabukkajagstranin loysir ikki trupulleikarnar allar.

Fyri tey gomlu kann henda tíð tykjast vónleys – tey kenna seg kanska freistað til at búra seg inni ella steingja tíðarinnar trupulleikar úti. Tey kenna, at tey eru maktaleys, eins egnu virðir kunnu ikki longur nýtast. Tey tíma snøgt sagt ikki longur at luttaka. Men situr man eftir við slíkari kenslu, er upp á hægstu tíð at ávara seg sjálvan og onnur.

Tey gomlu hava atkvøðurætt til tey doyggjandi. Hesar atkvøður leggja eisini grundarlag undir politiska virkseminum.

Sostatt mugu tey gomlu ikki flýggja undan samfelagstrupulleikunum, men eiga sum medábyrgdarar at luttaka í kjakinum.

Persónligu inntøkurnar minka, tá ið ein verður pensionistur. Afturfyri, um so kann sigast, fær ein frælsi til sjálvur at avgera tilveruna og er ikki longur bundin av t.d. 40 tíma arbeiði um vikuna.

Torført er sjálvandi at ríva seg leysan frá teimum gomlu kendu lívsmynstrunum. Men tú noyðist at brúka títt forvitni, fyri harvið at geva teimum komandi pensionistaárunum innihald. Hesar fyrireikingar eiga at byrja, áðrenn ein er vorðin pensionistur. Pensionistatilveran er ikki uttan trupulleikar, men skal ikki í sjálvum sær verða ein trupulleiki.

Samanhaldið millum ættarliðini, sum fyrr var ein náttúrligur partur av gerandisdegnum, er vorðin meira ókend í nútíðarsamfelagum.

Nútíðin hevur næstan fyri neyðuni at býta okkum upp í aldursbólkar. Børn, ung, vaksin og tey gomlu fyri seg, og dagliga sambandið millum aldursbólkarnar er ikki av tí besta. Tíverri ein sera óheppin gongd.

Fyrr høvdu allir aldursbólkar brúk fyri hvørjum øðrum. Bólkarnir kundu ikki standa einsamallir. Allir partar vóru við í gerandisarbeiðinum. Aldursbólkarnir høvdu brúk fyri hvørjum øðrum – teir fingu nakað og teir góvu nakað. Sum ein sjálvfylgja og uttan at upplæringin beinleiðis var tilrættaløgd við lesiætlan o.ø., so fór lívsins upplæring fram við heimsins bestu lærarum og næmingum. Eitt lærara-næming samband, sum bygdi á virðing.

»Við hárutum hondum tóku teir dreingin og settu á knæið«.

Henda virðing og hetta samband millum aldursbólkarnar er neyðugt, um vit framhaldandi skulu hava okkara eyðkenni sum føroysk tjóð.

»Grein honum lutir, ið ættin kosti til stavnhald.
Lívføri títt er slektin, tey sum í mold liggja.
Koma tey stutt ella longur, tú skal víðari byggja.
Lívlát er ikki deyðin, lívlát er hetta at seta førningin av sær við vegin,
tað sum frá fedrunum goymdist og sum tú sjálvur søkti, meðan tú førkaði fótin.
Sonurin tekur aftur viðføri títt at bera longur fram á vegin«.

Partvís inspirerað av Sameindu Tjóðum og partvís av EF, men mest av áhuganum frá okkara egnu hevur Føroya Landsstýri lýst dagin í dag og dagin í morgin sum føroyskar eldradagar.

Til tess at fyrireika hesa stevnu heitti landsstýrið á trý fólk. Eg fari her at nýta høvið at takka tykkum trimum Eydnu Háberg, Marjun Smith, Brynjálvi Borðoy fyri tað góða og eldhugaða fyrireikingararbeiðið, tit hava gjørt. Skráin er væl samansett, og eru allar fortreytir skaptar fyri at fáa eina góða og gevandi stevnu. Hjartaliga tøkk tit trý.

Landsstýri skifta við jøvnum millumbili, men vil eg heita á tann, sum einaferð setist í mín stól sum landsstýrismaður í almannamálum um at taka henda táttin uppaftur. Tað skal verða mítt ynski, at hetta verður eitt afturvendandi tiltak hvørt ár.

Eg vil annars eisini takka øllum teimum, sum á einhvønn hátt virka fyri, at henda stevna verður veruleiki – fyrilestrahaldarum, undirhaldarum o.ø. Eisini ein tøkk til Jógvan Páll Háberg fyri ta væleydnaðu klippmyndina av ommuni og ommusoninum.

Tá ið valið av yvirskriftini er fallið á linjuna »Gott er at kenna hitan av hondum, ið sleptu«, so er tað sanniliga ikki av tilvild. Fedranna tala rúmar tí sunna og rætta eldrapolitikkinum. Av sonnum eitt framúr dygdarverk.

Yvirskriftin undirstrikar, at hvørt ættarlið hevur sína virkistíð, men at tað er av týdningi, at lunnin ikki fær tíð at kólna, áðrenn teir ungu seta seg við árarnar. Mynd av tí neyðuga bindiliðnum millum ættarliðini.

Øll eru vit einstaklingar við egnum sereyðkenni, evnum og eginleikum, og takk fái Gud fyri, at so er, men treytin fyri, at okkara lívsyrki skal eydnast er, at tað verður framt í tøttum tilknýti til tey, sum undan fara og tey, sum eftir okkum koma.

Við hesum orðum skal eg vegna Føroya Landsstýri seta »Føroysku Eldradagarnar 1993«.

Góða stevnu.

Búmerkið fyri Eldradagarnar 1993, er klippmynd av ommuni og ommusoninum, sum Jógvan Páll Háberg, listamaður, hevur gjørt

---

Lesarabrøv

Politiskt stórvask á Argjum

Nú er nógv skrivað og sagt um støðuna á Argjum, hví hon er íkomin, eins og spurnartekin er sett við hvat peningurin er brúktur til.

Ein long grein stóð í bløðunum har ein fyrrverandi bygdaráðslimur (Carl Erik Mortensen) leggur bygdaráðini aftan á hansara tíð undir at vera óvirkin, ódugnalig, óbrúkilig, at gera vitleysar íløgur og harvið økja óneyðugt um skuldina hjá kommununi. Eisini vísir hann á at bygdaráðið kom til skorin klæði í 1989.

Rætt er, at bygdaráðið, sum sat setuna 1989-92, yvirtók eina fult útbygda kommunu, men sanniliga eisini kostnaðin av hesum íløgum. Flestu arbeiðini vóru sett í gongd í tíðarskeiðnum 85-88 og strektu seg inn í 89. Eisini lá ein eftirstøða til Tórshavnar Kommunu upp á uml. kr. 7 mill. So sjálvsagt mátti skuldin vaksa. Rentubyrðan og avdráttirnir av hesum bindum gjørdu, at lítið var eftir at húsast við.

Undirritaði skal ikki taka dagar ímillum hvørjar íløgur av hesum hava verið vitleysar, tað valdast eygað, sum sær.

Av størri bindingum, sum gjørdar eru í setuni 89-92 kunnu nevnast: Kommunuskrivstovan, Hamarin og goymlsuhøllin.

Kommunuskrivstovan: Henda iløga upp á kr. 3 mill. lætti um raksturin við kr. 200.000,- fyrsta árið. Leigan í Albert Hall var komin upp á kr. 500.000,- árliga. Henda leiga bleiv eisini dýrtíðarviðgjørd við 9,5% og var soleiðis vaksandi. Fyri kr. 300.000,- árliga situr umsitingin nú í egnum hølum.

Hamarin: Her fór eitt arbeiði í gongd leyst av bygdaráðnum. Hetta arbeiðið skuldi hvíla í sær sjálvum. Ein nevnd bleiv sett við **líkastillaðum** limum frá bygdaráðnum at taka sær av hesum máli. Sáttin, sum bant AK at rinda ágóðan hjá byggifelagum, kom ongantíð á bygdaráðsborðið, tað stendur fast. Hetta má sigast at vera eitt mistak, tá ið hugsað verður um avleiðingarnar av **hesi sátt á raksturin** 1993. Tó skal viðmerkjast, at nevndin, sum arbeiddi við málinum, hevði serkønt bankafólk at ráðføra seg við og heimild til at umboða bygdaráðið.

Allar byggiútreiðsurnar vóru fíggjaðar av einum banka, tá ið tíðirnar so brádliga versnaðu fekk hesin kaldar føtur og bakkaði fullkomuliga út úr samstarvinum. AK stóð nú eftir við sviðanum. Fígging fekst heldur ikki frá nøkrum. Hevði hetta verið fíggjað á vanligan hátt hevði AK ikki hoknað, sum hon gjørdi. Tað er sostatt ikki byggingin í sær sjálvum, men heldur vánaligu tíðirnar og vantandi møguleikar fyri fígging nú partur av útreiðslunum fall aftur á AK, sum fekk kommununa á knøini.

Goymsluhøllin: Hendan bleiv keypt tí at Íshúsið (núverandi goymsluhøllin) var lovað Sjósavninum. Sostatt var grundarlagið fyri hesa íløgu at AK skuldi flyta úr nevnda húsi.

Skal hyggjast í »bakspeglið« kann sigast, at bygdaráðið longu í 1989 átti at minkað munandi um útreiðslurnar ella hækkað skattaprosentið í mun til hesar. Heldur ikki var lætt at fóta sær á einum lánimarknaði, har lángevarin í stóran mun setti treytirnar í sambandi við fígging og umfígging av stóru skuldini.

Tær avgerðir, sum tiknar verða, byggja á tað grundarlag, sum fyriliggur, tá støða skal takast. Tá ið fortreytirnar síðani broytast, kann tað henda at avgerðin gjørdist skeiv. Men sum orðatakið sigur, »gjørd gerð fær onga vend«, so hesum avgerðum mugu vit eisini liva við og taka ábyrgdina av.

Serliga nógv er lagt eftir bygdaráðsformanninum Erland T. Jacobsen. Tað vísir seg at vera lættast at lata hann standa einsamallan, nú tað stendur á. Vit hava ikki altíð verið á einum máli um tiknar avgerðir, treyðugt so, men Erland T. Jacobsen hevur ikki sitið einsamallur í bygdaráðnum hesi árini.

Annars las eg eina skemtisøgu um politikk, sum ljóðar nakað soleiðis: »At gera mistøk er menniskjaligt, men at geva øðrum skyldina, **tað** er politikkur«. Hetta seinasta uppliva vit í ólukkumát í hesum døgum.

Tað er ikki stórt meira at siga um hetta, tølini í vísta yvirliti tala fyri seg. Hetta eru almenn tøl frá borgarafundinum á Argjum. Talvan vísir íløgurnar í tíðarskeiðnum 1984 til og við 1992.

Samanumtikið kann sigast, sum Óli Petersen í einum av sínum frálíku tekningum gjørdi vart við, »Her skal ikke prioriteres, vi vil have det hele«. Hetta seinasta er tíanverri nokk nærmast sannleikanum, tá hugsað verður um støðuna á Argjum eins og landinum sum heild.

Bartal Kass
bygdaráðslimur
á Argjum 89-92



Íløgur hjá Argja Kommunu 1984 - 1992

Kvinnuhúsið

Ráðgevingin hjá Kvinnuhúsinum er opin hvønn hósdag frá kl. 19.00–21.00, inngongd hjá KFUM, Oman Pisuvarða 2, ella á tlf. 17200.

Kvinnuhúsið er opið gerandisdagar frá kl. 14.30–16.30. Telefonin, 17200, svarar hvønn dag frá kl. 14.30–7.00 á morgni.

Ringið!
– og vit skriva
☎ 11820